# KOM OG LES!

*- barna- og ungdómsbókmentafestivalur 2014*

**Kunning til skúlar og skúlabókasøvn**

Í viku 14 verður ljós varpað á føroyskar barna- og ungdómsbókmentir, og vit bjóða tí skúlum at fáa vitjan av rithøvundum og/ella sjónleikarum, sum kunnu geva næmingunum eina 'eyka bókmentaupp -living'. Summir rithøvundar lesa upp úr egnum bókum og vilja fegnir tosa um tær, meðan aðrir gera verkstovur, har næmingarnir sjálvir skulu vera virknir.

Sjónleikararnir skipa fyri verkstovum, har denturin verður lagdur á upplestur. Næmingarnir fáa ymisk amboð, teir kunnu brúka í eini roynd at gera ein tekst meira livandi.

Allar vitjanirnar verða millum 45 og 90 minuttir – alt eftir hvat rithøvundurin hevur at bjóða (sí yvirlitið). Vit hava lagt dent á, at fyrireiking ikki er neyðug.

Í yvirlitinum niðanfyri sæst, nær rithøvundarnir og sjónleikararnir eru til taks, hvat teir ætla at gera og hvørjar aldursbólkar, teir í høvuðsheitum venda sær til.

Leygardagin 5. apríl verður ein endabrestur í Norðurlandahúsinum, har rithøvundar eisini verða við, møguleiki verður at hoyra ævintýr eftir Jakob Jakobsen, gera sína egnu bók, gera talgild bókaummæli og nógv, nógv annað.

Sámal Blak hevur gjørt eina installasjón – eitt bókaunivers – , har til ber at ganga runt millum verur úr føroyskum barnabókum, sum eru komnar út í tíðarskeiðnum 2008-13. Bókauniversið stendur uppi í Skálanum í Norðurlandahúsinum frá 30. mars til uml. 10. apríl. Í hesum tíðarskeiði ber til at vitja tað í upplatingartíðini hjá Norðurlandahúsinum—eisini teir dagar, symfoniorkestrið hevur barnakonsertir í húsinum. Eitt uppgávuhefti verður gjørt til bókauniversið.

**Skúlavitjanirnar eru ókeypis.**

Tit kunnu "bíleggja" rithøvund ella sjónleikara við at skriva ella ringja til Solveig Debess, solveig@nam.fo ella tlf. 555157 skjótast til ber og **í seinasta lagi 18. mars.**

Tit fáa svar aftur 24. mars, um tað ber til at eftirlíka ynskjunum.

Í fyrireikingarbólkinum, sum hevur arbeitt við hesum, eru umboð úr Bókadeild Føroya Lærarafelags, Tjóðpalli Føroya, Býarbókasavninum, Rithøvundafelagnum, Norðurlandahúsinum og Námi.

Vegna arbeiðsbólkin

Solveig Debess

**Rithøvundar,**

**sum kunnu fara út á skúlar í viku 14:**

Aase Bømler Olsen, s. 3

Ingun Christensen, s. 3

Helle Thede Johansen, s. 4

Sámal Soll, s. 4

Sólrún Michelsen, s. 5

Bergur Rasmussen, s. 5

Marjun Syderbø Kjelnæs, s. 5

Rakel Helmsdal, s. 6

**Sjónleikarar,**

**Sum kunnu fara út á skúlar í viku 14, s. 7:**

Hans Tórgarð

Katarina Nolsøe

Laura Joensen

Páll Danielsen

## Stutt lýsing av rithøvundum og tiltøkunum hjá teimum:



**Aase Bømler Olsen**

*Stuttleika tær* (2001), *Bei bei, lítli vinur* (2011), *Mira mús og Milo* (2011), *Mira mús og Milo spæla* (2012)

**Lýsing av tiltakinum:** Verkstova: Vit skriva í felag eina søgu til 13 tekningar, sum verða varpaðar upp við PowerPoint. Vit nýta orð, sum eru løtt at stava og lesa, meðan tosað verður um, hvat myndirnar sýna okkum.
Ynskiligt er, at børnini fáa eitt eintak av lidnu 'bókini' við sær heim.

**Tilfar/útgerð:** Telda og uppvørpa, litprentari og pappír.

**Flokkar:** 1.-2. fl. (helst ikki meir enn ein flokkur í senn)

**Fyrireiking:** Eingin

**Tíð:** 90 min. Fyrrapart og seinnapart allar dagar í viku 14.



**Ingun Christensen**

*Garðvættrarnar gera uppreistur* (2010), *Eiturkoppaprinsessan* (2013), 'Jóladunnan' í *Míni jólabók 2013*.

**Lýsing av tiltakinum:** Upplestur og prát.

**Tilfar/útgerð:**

**Flokkar:** 1.-5. fl.

**Fyrireiking:** Lesa og evt. gera spurningar – men eingin treyt.

**Tíð:** 45-60 minuttir. Fyrrapart og seinnapart allar dagar í viku 14.



**Helle Thede Johansen**

*Vinurin* (2011), *Vikarurin* (2010)

| | |
|---|---|
| **Lýsing av tiltakinum:** | Eg hugsi at geva tykkum innlit í, hvussu eg fái íblástur og hvussu eg arbeiði við at skriva – og samstundis vónandi geva tykkum dirvi og hug til at skriva. Skrivivenjingar .... At enda fari eg ... kanska ... møguliga ... um so er at tey í 5.B aftur hava møtt onkran løgnan persón ... at lesa eitt brot úr bók nummar 3. |
| **Tilfar/útgerð:** | Næmingarnir skulu hava blýant og pappír. |
| **Flokkar:** | 4.-5. fl. |
| **Fyrireiking:** | Evt. gera spurningar og tekningar til Tey í 5.B. |
| **Tíð:** | 60-90 minuttir. Fyrrapart og seinnapart allar dagar í viku 14. |



**Sámal Soll**

'Ver ikki bangin' í *Spøkilsið sum flenti* (2006), *Mín jólabók* 2006, 2008, 2010, 2011, 2012, 2013

| | |
|---|---|
| **Lýsing av tiltakinum:** | Skriviverkstaður: *Finna-uppá-søgu-skeið*. Hvat skulu vit brúka, tá ið vit finna uppá søgur? |
| **Tilfar/útgerð:** | Blýant og pappír. |
| **Flokkar:** | 4.-5. fl. |
| **Fyrireiking:** | Eingin. |
| **Tíð:** | 60-90 minuttir. Týs. 8-10 og 12-13.30, mik. 8-10, hós. 10-11.30, frí. fyrrapart og seinnapart. |



**Sólrún Michelsen**

*Argjafrensar* (1994), *Útiløgukattar* (1996), *Hin útvaldi* (1999), *Geislasteinar* (2002), *Loppugras* (2003),
'Óvitar' í *Spøkilsið sum flenti* (2006), *Torkils døtur* (2013), *Mín jólabók* – 1992, 1997, 1998, 1999, 2000, 2001, 2003, 2005, 2007, 2009, 2011, 2012

**Lýsing av tiltakinum:** Upplestur úr ymsum bókum og prát

**Tilfar/útgerð:**

**Flokkar:** 6.-7. fl.

**Fyrireiking:** Gott um næmingarnir kenna okkurt—men eingin treyt.

**Tíð:** 45-60 minuttir, Fyrrapart og seinnapart týsd. og mikudag.



**Bergur Rasmussen**

*Sigursteinurin* (2008) + nógvar umsetingar, t.d. *Herviligi Henry og Hungursleikirnir*

**Lýsing av tiltakinum:** Upplestur av umsettum tekstum

**Tilfar/útgerð:**

**Flokkar:** Frá 4. flokki og upp

**Fyrireiking:**

**Tíð:** 45 minuttir. Fyrrapart mánadagin.



**Marjun Syderbø Kjelnæs**

*Skriva í sandin* (2010)

**Lýsing av tiltakinum:** Upplestur og prát

**Tilfar/útgerð:**

**Flokkar:** 8.-10. fl.

**Fyrireiking:** Lesa bókina og gera spurningar

**Tíð:** 45-60 minuttir. Fyrrapart og seinnapart mán., týs., hós. og fríggjadag.



**Rakel Helmsdal**

*Tey kalla meg bara Hugo* (1995), *Søgur úr Port Janua* (1996), *Hvørjum flenna likkurnar at, Hugo* (1997), *Drekar og annað valafólk* (1998), *Kom yvirum, Hugo* (2003), *Tey kalla meg bara Hugo* (2. útg. 2003), *Nei! segði lítla skrímsl* (2004), *Stór skrímsl gráta ikki* (2006), 'Fimm mans til eina kvartett' í *Svartideyði og aðrar spøkilsissøgur* (2006), *Gott hugflog, Hugo* (2007), *Myrkaskrímsl* (2007), *Skrímslasótt* (2008), *Várferðin til brúnna.Úr mosakulluni 1* (2008), *Veturin hjá Undu. Úr mosakulluni 2* (2009), *Skrímslavitjan* (2010), *Spitølsk í Elskar - elskar ikki* (2010)., *Skrímslahæddir* (2011), *Veiða vind* (2011), *Klandursskrímsl* (2012), *Hon, sum róði eftir ælaboganum* (mars 2014), *Mín jólabók* 2005, 2007, 2008, 2013

**Lýsing av tiltakinum:** Upplestur og prát

**Tilfar/útgerð:**

**Flokkar:** **1**.-3. fl., *Skrímslabøkur*

4.-5. fl., 'Miljusøgur' úr *Svartadeyði* og *Míni jólabók* 2005, 2007, 2008 og 2013.

6.-7. fl., *Hugo*-bøkurnar

8.-10. fl., *Hon sum róði móti ælaboganum* (Søgan 'Spitølsk', sum stendur í *Elskar— elskar ikki* er partur í nýggju bókini, *Hon, sum róði eftir ælaboganum.* Bókin kemur út í handlarnar mánadagin).

**Fyrireiking:** Gott, um næmingarnir høvdu lisið okkurt, men eingin treyt.

**Tíð:** 45-60 minuttir. Fyrrapart og seinnapart allar dagar.

## Sjónleikarar



Hans Tórgarð



Katarina Nolsøe



Laura Joensen



Páll Danielsen

**Lýsing av tiltakinum:** Sjónleikararnir skipa fyri verkstovum, har denturin verður lagdur á upplestur. Næmingarnir fáa ymisk amboð, teir kunnu brúka í eini roynd at gera ein tekst meira livandi.

**Tilfar/útgerð:**

**Flokkar:** Frá 4. flokki

**Fyrireiking:**

**Tíð:** 60-90 minuttir. Fyrrapartar og seinnapartar allar dagar.

Sjónleikararnir kunnu fara 2 og 2 ella hvør sær — tað veldst eitt sindur um bólkastødd.